# Starvsfólk til Stjórnarskrivstovuna

●●●●●●●

"Skipa prikkarnar í fimm beinar linjur við trimum prikkum í hvørjari linju"



Stjórnarskrivstovan er ein stápur hjá stjóranum, sum í fyrsta lagi skal vera leiðsluni til hjálpar, men hevur eisini fleiri umsitingarligar uppgávur fyri alla fyritøkuna.

Menningin og broytingarnar seinnu árini hava havt við sær, at virksemið á Stjórnarskrivstovuni er munandi økt og broytt. Arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar og tann sum sett/ur verður, kemur at verða við í flest øllum uppgávum á Stjórnarskrivstovuni. Uppgávurnar á Stjórnarskrivstovuni eru m.a. hesar:

· málsviðgerð
· fundarfyrireiking og -samskipan
· journalisering og arkivering
· týðing og rættlestur
· skrivarauppgávur
· umsitingarligar uppgávur fyri starvsfólkadeildina
· telefonavgreiðsla

Søkt verður tí eftir einum persóni sum er fleksibul, er før/ur fyri at hava hava nógvar bóltar í luftini í senn og sum kann varðveita yvirlitið, tá nógv er at gera.

Í løtuni arbeiða trý fólk á Stjórnar-skrivstovuni, sum m.a. hevur ábyrgdina av posti, journal, ávísum fundum, ferðing, vitjanum vm. Á Stjórnar-skrivstovuni er mangan lívligt - og eisini áhugavert.

Arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og ymiskar. Viðkomandi ið sett/-ur verður, skal tí hava

· viðkomandi útbúgving
· góðan málkunnleika og serstakliga hollan kunnleika til føroyska rættskriving
· royndir við vanligum skrivstovuarbeiði
· kunnleika til journalarbeiði
· teldukunnleika á brúkarastøði
· almenna vitan

Neyðugt er, at tann, ið sett/ur verður, er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Stjórnarskrivstovuna ella Starvsfólkadeildina á tel. 303030.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. juni 2002 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

- ella til teldupostadressu: ft@ft.fo.

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, kapping er komin á økinum og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele, herundir starvsfólk á Stjórnarskrivstovuni, skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum. Vit søkja eftir skikkaðum fólki, sum vil verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!


Strandferðslan:

# Trupulleikin ikki loystur við vánaligu rakstrargøgnunum

**Poul Jákup Thomsen, ferðafólkaflutningsleiðari á Strandferðsluni, harmast um truplu flutningsviðurskiftini, sum vóru um Norðoyastevnuna, men hann vísir eisini samstundis á, at Strandferðslan gjørdi sítt besta fyri at gera flutningin til og úr Klaksvík so lættan sum gjørligt**




NORÐOYASTEVNAN 2002

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** – Tey avbera vánaligu rakstrargøgnini, sum vit hava gera tað alt annað enn lætt at loysa tílíkar trupulleikar, sum vit eru og hava verið í, sigur Poul Jákup Thomsen. Hann vísir á, at meðalaldurin í flotanum hjá Strandferðsluni er yvir tríati ár.

Men hann sigur eisini, at verkfallið hevur órógvað sera nógv í ár, tí í veruleikanum skuldi Smyril havt verið í dokk langt áðrenn Norðoyastevnu, men so orsakað av verkfallinum bleiv tað seinni enn ætlað.

Í viðmerking til tað sum fór fram undir steypahandanini í Klaksvík, sigur Poul Jákup Thomsen, at tað eru strangir reglar fyri hvussu mong fólk sleppa við eini ferju, og tá stevnur eru, so hevur Strandferðslan havt ringar royndir við at fólk royna at sleppa sær umborð, hóast skipið er fult.

– Tað er so vandamikið við tílíkum, og fyri at sleppa undan slíkum óhepnum støðum, so verður rampin á skipinum bara koyrdur upp, greiðir Poul Jákup frá. Hann sigur eisini, at ein avtala er í millum Strandferðsluna og RSF um, at tað er RSF, sum tekur sær av stýringini.

Spurdur um hví helmingurin av bjargingarútgerðini hjá Dúgvuni varð koyrd umborð á Scaniu, sigur Poul Jákup, at tað vísti seg at vera tann besta loysnin.

– Bjargingarútgerðin í dag er sera teknisk innviklað, at niðustøðan var, út frá tí sjónarmiðinum, at handan loysnin var tann frægasta.

Orsøkin til at Scania ikki hevur nóg mikið av bjargingarútgerð er, at í Estlandi eru trygdarkrøvini ikki so høg sum her heima.

i Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2439, P/F Hýsisá, 370 Miðvágur.

Viðtøkur broyttar: 15.05.2002.
Kapitalur:
Hækking við kr. 1.000.000,00 til kr. 1.500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 1.000.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 31. mai 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3364Navn: Sp/f Kvikkeyp
Adressa: Tórugøta 26, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 23.05.2002
Viðtøkudato: 23.05.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Hans Michal Hansen, Tórugøta 26, 100 Tórshavn.
Stjórn: Hans Michal Hansen, Tórugøta 26, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f Eyðfinnur Guðjónsson, Tórgarðsgøta 13, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 23.05.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, handverk, tænastuvinnu og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 29. mai 2002

Kristin Balle



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**FORD ESCORT 1.6**
árg. 1997, í góðum standi, til sølu.
*Tlf. 219472*

**PEUGEOT 306 XL**
árg. 7/96, koyrt 76.000 km, til sølu fyri uml. 60.000 kr.
*Tlf. 258500*

**FORD SIERRA 1.6**
árg. 87, koyrir væl. Kr. 3000,-
*Tel. 252889*

**FELGUR TIL SØLU**
Fýra felgur til Ford Escort til sølu.
*Tlf. 332286*

**CITROEN XANTIA WEEKEND**
st.car 1.9 Turbo Diesel, árg. 03/99 til sølu. Litur: Silvurgráur, 48.000 km, aut. klimaanlegg, el-rútar, el-spegl, sportfelgur o.m.a. Prísur 155.000 kr.
*Tlf. 216623*

**TOYOTA HILUX 2.4**
4 x 4, árg. 2001, koyrt 23.000 km til sølu um nóg høgt boð fæst.
*Tlf. 444314 ella 282722 e. kl. 18*

**MITSUBISHI LANCER**
1.8 diesel, árg. 87, nýsýnaður, hevur sleipikrók, bíliga til sølu.
*Tlf. 213250*

**FORD ESCORT GHIE**
Nýsýnaður Ford Escort Ghia, koyrt 107.000 km, árg. 88, prísuppskot: 10.000 kr.
*Tlf. 320645 ella 283495*

**PEUGEOT 106 GTI**
Ein sera flottur Peugeot 106 GTI til sølu. Um ynskist, kann gott stereo vera við. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 220511*

**HONDA ACCORD 1.8**
árg. 7/2000, 13.000 km, er sum nýggjur bilur, til sølu fyri 178.000 kr.
*Tlf. 211950*

**PEUGEOT 406 DIESEL**
árg. 10.7.1997, koyrt 130.000 km. Sýnaður 28.5.2002.
*Tlf. 282327 ella 441326*

**NISSAN PATROL**
3.3 Turbo, árg. 88, longra modellið, setur aftan, koyrt 237.000.
*Tlf. 211777*

**VW PASSAT**
32 – diesel, árg. 87. Píkadekk fylgja við. Sýnaður apríl 2002.
*Tlf. 441244*

**NISSAN PATROL**
4200 ccm, árg. 91, alu-felgur v/ breiðum dekkum, forkromaðum »kengurugittara«, el-rút, sentrallás. Bilurin sær gott út og er í góðum standi.
*Tlf. 220744*

**TOYOTA CAMRY**
2.0 GLI, árg. 87 til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 227512*

**NISSAN PATROL 3.3 TD**
árg. 88. Koyrir sera væl – til sølu fyri 20.000 kr. ella í umbýti við ein speedbát.
*Tlf. 214283*

**FELGUR VIÐ DEKKUM**
4 stk. felgur við dekkum »Goodrich« P205/70R14 M+S við 6 holum. Hava verið brúkt til Nissan King Cab pick up. Prísur tils. 600 kr.
*Tlf. 220142*

**OPEL ASCONA 1.8i**
er sýnaður 31.03.02, hevur powerstýring og er í sera góðum mekaniskum standi. Til sølu fyri 8.000 kr.
*Tlf. 314131*

**TIL SØLU**
Peugot 405 GTX Turbo Diesel árg. okt. 95, koyrt 114.000 km., í góðum standi til sølu fyri 80.000 kr. Àhugaði ringi
*tlf. 457570 ella 218569*

**TOYOTA CARINA E 1.8 GLI**
til sølu. Skrásettur fyrstu ferð 96.10. Hevur koyrt 72.000 km. 15" alufelgur við góðum dekkum, umframt 4 góð heilársdekk á felgum. Hevur El-rútar, el-spegl og sentrallás. Er í góðum standi.
*Tlf: 264767 ella 457322*

**DEKK YNSKJAST**
4 dekk ynskjast til keyps. Stødd umleið 165 x 13.
*Tlf. 256853*

**JEEPUR TIL SØLU**
Mitsubishi Pajero 4 x 4, árg. 1988, diesel til sølu til hægstbjóðandi yvir 15.000 kr.
*Tlf. 250795, Toftir*

**PEUGEOT 405 GTX**
Turbo Diesel, árg. okt. 95, í góðum standi, til sølu fyri 80.000 kr. Áhugaði ringið
*tlf. 457570 ella 218569*

**BMW 525 TD**
árg. 89, er í góðum standi og koyrir væl. Nýggj summardekk, bíliga til sølu.
*Tlf. 252072*

**YNSKIST**
Motorur til Mazda T3500, árg. 86, ynskist til keyps.
*Tlf. 220502 ella 315280*

**TOYOTA COROLLA**
3 1/2 ára gamal, 2000 Diesel, í sera góðum standi, til sølu fyri bert 100.000 kr. Møguliga í býti við annan bil, uml. 40.000 kr. Ert tú áhugað/ur, ber altíð til at ringja á
*tlf. 255381*

**PEUGEOT 306 1.8**
112 HK, til sølu, árg. 5/2000, koyrt 16.000 km, metalgráur, 5 hurðar, sentrallás, cd-anlegg, el-rútar framman, ABS bremsur, fýra píkadekk á felgum.
*Tlf. 0045 38805296 ella 20675296*

**SPORTFELGUR**
Fýra sportfelgur til sølu, dekkstødd 205/45-16
*Tlf. 226358*

**VOLVO 340 TIL SØLU**
model 89. Hevur ikki nr. plátur, er góður sum reservadeilir, kann gerast í stand. Ein nýggj kobling og nýggjur hondbrensukápil fylgja við, hevur góðan motor, selist fyri 4000 kr.
*Tlf. 443096 eftir kl. 19*

**MERCEDES BENZ 300 TD**
7 setur, poverstýring, sóltak, krók, inkl. píkadekk, til sølu.
*Tlf. 224910*

**TOYOTA CAMRY**
árg. 1986, bíliga til sølu. Bilurin hevur skaða, men koyrir annars væl.
*Tlf. 315854*

**TOYOTA CARINA**
árg. 87 til sølu sum eykalutur fyri 2.500 kr.
*Tlf. 217219*

**SPORTFELGUR**
4 aluminium sportfelgur 205/50 R15 4 hol v/ dekkum á. Til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 447484 ella 253864*

**FELGUR**
Fýra felgur til Ford Escort bíliga til sølu.
*Tlf. 332286*

**BÍLIGAN BIL?**
Honda Civic, frá des. 90, sýnaður des. 91, sportsfelgur, 6.000 kr.
*Tlf. 328009 e. kl. 18 ella 261677*

**VW GOLF**
frá sept. 1996, er til sølu. Bilurin hevur koyrt 50.000 km, og er í framúr góðum standi.
*Tlf. 315153 ella 216760*

**FORD SIERRA 1.6**
árg. 88, til sølu fyri 7.500 kr. Útvarp v/ fløguspælara, 2x200 w hátalarar fylgja við, nýsýnaður, ongan kross.
*Tlf. 211259*

**HONDA CIVIC 1.5 V-TEC**
til sølu, árg. 96. Bilurin hevur el-rútar, el-spegl, sentrallás og er senkaður.
*Tlf. 220960*

**TIL SØLU**
Mazda 323 1,5 sport, frá 85, nýsýnaður og fekk ongan kross. Er í góðum mekaniskum standi og nógv útgerð fylgir við. Kostnaður 13.000 kr. ella hægstbjóðandi.
*Tlf. 224659*

**SPORTSFELGUR**
Spildurnýggjar, flottar sportsfelgur á dekkum til sølu vegna feilkeyp. Stødd: 4x114,3 - 195/50-15. Passa til: Mazda, Mitsubishi, Honda Accord, Hyundai, Daewoo Matiz, Suzuki og Nissan Primera v.m. Verður selt samlað fyri 5.000 kr. Hava koyrt uml. 4-5 dagar tilsamans.
*Tlf. 224659*

**RENAULT LAGUNA 2,0**
árg. 96, sportsfelgur og senkaður, til sølu. Prísuppskot 58.000 kr.
*Tlf. 260834 - 220770*

**MITSUBISHI SHOGUN L300**
4x4 við setri aftan til sølu. Skrásettur sum persónbilur, km 211.000. Lakeraður 03.2001, skrásettur fyrstu ferð 17.8.92.
*Tlf. 250205*

**TIL SØLU**
Ein Ford Sierra Sedan, árg.86, koyrir væl, men krevur onkra ábót, til sølu fyri 4800 kr.
*Tlf. 316022 ella 252922*

**OPEL ASTRA**
árg. 95, til sølu fyri 40.000 kr.
*Tlf. 423236*

**TIL SØLU**
Ein Ford Escort 1.6 Ghia, árg. 87, og ein Ford Escort 1.6 Savoy, árg. 87, til sølu fyri 1.500 kr. stk. sum eykalutir.
*Tlf. 423236*

## Amboð

**MOTORSVEISIAPPARAT**
til sølu fyri 8.000 kr. Hevur eisini 220 volt.
*Tlf. 317414 ella 226315*

## Arbeiði

**TILBOÐ YNSKIST**
upp á at skifta bjálving og gólv í kjallaraíbúð í Havn.
*Tlf. 215673*

**TILBOÐ YNSKIST**
upp á at laða garð rundan um hús og at leggja brotflísar á tún. Talan er um eitt umfatandi arbeiðið.
*Tlf. 447089*

**UNG GENTA SØKIST**
Familja, 2 vaksin og 4 børn (1 1/2, 5, 8, 12) søkja unga gentu yvir 18 ár (ikki roykjar) til hjálp í húsi og barnaansing av og á! Góða løn og nógvir ágóðar. Byrjan: ca. 15. august.
*Tlf. 0045 45505160/0045 60605165*

## Barnaútgerð

**MYRKAGRØNUR SILVERCROSS**
barnavognur við madrassu, kurv og regnslagi og ein Brio stólur við koyriposa og regnslag og ein baby monitor.
*Tlf. 372154*

**YNSKIST**
Vælhildin stólvognur við tilhoyrandi koyriposa ynskist. Prísuppskot uml. 1000-1500 kr.
*Tlf. 315792 eftir kl. 16*

**TIL SØLU**
Ein vælhildin myrkabláur Brio barnavognur v/ baby-lyft til sølu fyri 2.000,- Ein grulvigarður til sølu fyri 500,- og ein barnasong við madrassu fyri 1000,-
*Tlf. 319419*

**BARNAVOGNUR**
Ein myrkabláur Simo barnavognur, baylift og regnslag til sølu, árg. 2000, bert nýtt til eitt barn.
*Tlf. 314845 ella 257491*

**GRÁUR »SCANDIA«**
barnakoyristólur v/ galesju til sølu fyri 700,- kr. Regnslag fylgir við.
*Ring 319897 best eftir kl. 18*

**»ALTAN BARNAVOGNUR«**
ynskist til keyps fyri ein bíligan penga.
*Tlf. 316027 - 407*

**MYRKABLÁUR**
Simo kombivognur til sølu fyri 2000 kr., sær gott út.
*Tlf. 455108*

**SVARTUR SILVERCROSS**
barnavognur við regnslag bíliga til sølu.
*Tlf. 456739, 455804 ella 253639*

**RIMASONG**
Ein rimasong til sølu fyri 300 kr. Babydýna fyri 100 kr. Koddi fyri 50 kr. Koyriposti fyri 50 kr.
*Tlf. 451192*

**ODDER VOGNUR YNSKIST**
Odder barnavognur við regulerbarðum handtaki ynskist.
*Tlf. 315758*

**TIL SØLU**
Tvíburastólur (kombi), babylift, vøgga, pusliborð og barnavognur (góður til pleygu).
*Tlf. 424516 - 256929*

## Bátaútgerð

**TIL SØLU**
Ein útróðrabátur í bólkinum 4A (15-40 tons) til sølu við fiskiloyvi og bankaloyvi um nóg høgt boð fæst.
*Tlf. 282722 eftir kl. 18*

**BÁTUR TIL SØLU**
Stórt 7 mannafar við 10 hesta Saab við fiskiloyvi til sølu.
*Tlf. 423567 ella 423357*

**VOLVO PENTA**
Ein Volto Penta TMD 40, 6 syl. 136 HK.
*Tlf. 224693 ella 318087*

**BENSINMOTORUR**
2 cyl. FM bensinmotorur v/ skrúvutoyi og stevnirøri – prísur 500,- kr.
*Tlf. 228447*

**BÁTUR YNSKIST**
Frambygt 6-8 mannafar ynskist til keyps. Helst Kaldbaks-bátur.
*Tlf. 316264 ella 219264*

**HEVUR NAKAR**
2 brúktar hondsnellur til sølu.
*Tlf. 318129 ella 218399*

**BÁTASPÆL**
Bátaspæl til sølu.
*Tlf. 370216 ella 218216*

## Bingo

**BINGO**
Stórhúshøll leygardagin 8. juni.
*ÍF Smágentur/Fótbóltur*

**GOTT MATBINGO**
verður í Kappróðrarneystinum í Streymnesi mikukvøldið 5. juni kl. 19.00
*Streymastuðlar*

**SUÐUROYINGAR**
Gott bingo verður í Framtíðini í Vági mánadagin 10. juni kl. 19.00. 300 kr. til hvørja fulla plátu.
*Bygdarhúsfelagið Hov*

**GOTT BINGO**
verður í TB-húsinum tórsdagin 6. juni kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**DUNNUSPÆL**
verður í Sandvík týskvøldið 4. juni 02 kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Burturlutaðir verða havamøblar (ovalt borð og 4 stk. 5-pos. stólar) og annað. Eykaspælið er nú 2.700 kr. 20 kr.spæl verður eisini.
*Bygdarfelagið á Rananum*

**HEIMA-BINGO**
hjá Báruni fæst til keyps á posthúsinum og í sølubúðunum. Tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið. Heimabingo kanst tú spæla hvønn dag, og tú avger nær tú spælir. Má roynast.
*Bygdarfelagið Báran í Árnafirði*

## Bøkur

**TIL SØLU**
Grimbergs Verdenshistorien 16 bind, til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 322942*

## Burturm. /funnið

**EITT UR**
er funnið við parkeringsplássið við Konn vatn, Nes Eysturoy. Eigarin biðist ringja
*tlf. 448960 eftir kl. 17.30*

## Býli

**KLAKSVÍK/HAVNIN**
Kvinna ynskir íbúð ella lítil hús til leigu í Klaksvík ella í Havn. Ynskiligt er, at trý kømur eru.
*Tlf. 317200*

**LÍTIÐ LAGUR**
ella garasja ynskjast tilleigu frá miðjan august til eftir avtalu, turt, heitt, ongar trappur, breið hurð. Helst í Havn.
*Tlf. 214433*

**ÍBÚÐ/KAMAR**
Ungur maður søkir íbúð ella stórt kamar í Tórshavn skjótast.
*Tlf. 316490, Jón*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ ..........................

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:..........................................
Bústaður:......................................
Bygd/býur:.....................................
Tlf.: ............

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki